# Spara 2,2 mió. í rakstrinum

*Í ongum føri er talan um uppsøgn orsakað av misnøgd við starvsfólkið. Tvørturímóti harmar tað leiðsluna at noyðast at siga dugnaligum og álítandi fólki úr starvi, sigur stjórin í Sjónvarpinum, Tróndur Djurhuus, í tíðindaskrivi*



ÓLAVUR Í BEITI

Í tíðindaskrivi mikukvøldið frá stjóranum í Sjónvarpinum, verður sagt, at SVF hevur sera trongar fíggjarkarmar, og leiðslan hevur eftir drúgvar og nágreiniligar viðgerðir gjørt ta niðurstøðu, at neyðugt er at spara 2,2 mió. krónur í rakstrinum í ár til tess at hava eitt nóg trygt gjaldføri.

– Í hesum sambandi verða íløgur fyri uml. eina millión krónur útsettar, og vanligur rakstur verður skerdur 250.000 krónur. Hetta er sera harmiligt, av tí at stovnurin er illa fyri tøkniliga, og raksturin er longu frammanundan skerdur og sera tepur, sigur Tróndur Djurhuus.

Og víðari sigur stjórin í SVF, at enn harmiligari er tó, at neyðugt er at spara útvið eina millión krónur í lønum. Leiðslan hevur roynt at gera hesa sparing so lagaliga sum til ber, men tað er altíð nívandi, tá ið fólk verða uppsøgd, bæði fyri starvsfólkið, stovnin og leiðsluna.

### Onga almenna viðmerking

Í tíðindaskrivinum váttar stjórin í Sjónvarpinum, at uppsagnirnar raka seks starvsfólk, summi av teimum hava havt niðursetta tíð. Arbeiðstíðin verður eisini stytt hjá trimum starvsfólkum, og onkur fær haraftrat tilboð um fyribils at taka við øðrum starvi, eins og arbeiðstíðin hjá onkrum verður broytt nakað.

– Í ongum føri er talan um uppsøgn orsakað av misnøgd við starvsfólkið, sigur Tróndur Djurhuus, og leggur aftrat, at tvørturímóti harmar tað leiðsluna at noyðast at siga dugnaligum og álítandi fólki úr starvi.

– Leiðslan vil ikki gera nakra almenna viðmerking til tær einstøku uppsagnirnar ella broytingarnar í starvsviðurskiftunum, sigur stjórin í Sjónvarpinum í tíðindaskrivi, sum sent er út.

*Tey, ið uppsøgd eru í SvF starvast soleiðis: Eitt fólk í savninum, eitt fólk á mentanardeildini, eitt í avgreiðsluni, tveir bandmenn, ein sendimaður og trý onnur fólk eru sett niður í tíð*

# Hava eftirlit við rakstrinum av Sjónvarpinum

*Hvønn mánað síðan í mai í fjør hevur mentamálaráðharrin fingið frágreiðing frá leiðsluni SVF um gongdina á stovninum*



ÓLAVUR Í BEITI

Fyri ikki so langari tíð síðan fekk Signar á Brúnni frágreiðingina um Sjónvarp Føroya, sum Rasmussen & Weihe gjørdi, og frágreiðingin vísti nágreiniliga støðuna í SVF. Kringvarpslógin hevur havt sína ávirkan á støðuna hjá sjónvarpinum, har 1/3 av tilfarinum skal verða føroyskt tilfar, eftir hesi lóg, og hetta er so eitt av tí, sum stjórin í SVF hevur tikið til eftirtektar, tá ið hann hevur sett fleiri fólk til. Og so hava metingarnar sum gjørdar eru viðvíkjandi spølunum í sjónvarpinum ikki hildið, og hetta tilsamans hevur verið um at kollsiglt hesum loftmiðli í hvussu so er einaferð.

Umframt alt hetta, sum hevur verið við til at gjørt støðuna sera trupla bæði hjá sjónvarpsstjóranum og leiðsluni í SVF, og eisini hjá Sginari á Brúnni, mentamálaráðharra, hevur ein tyngri byggirokning frá 1997 gjørt støðuna sera trupla á fíggjarliga økinum hjá sjónvarpinum.

### Leiðslan velur sjálv

Í stuttari viðmerking við Sosialin, sigur Signar á Brúnni, at hann sendi skriv til leiðsluna í SVF í juni í fjør, har álagt er leiðsluni í fyrsta lagi at senda mentamálaráðharranum roknskapin fyri hvønn mánað, og nevnt verður eisini at gjørligt verður ikki í framtíðini at fáa nakra eykajáttan.

– Hesum hevur leiðslan so fylgt og tekur nú tey keðiligu stig sum takast mugu fyri at fáa stovnin at koyra, sigur Signar á Brúnni.

Spurdur um ikki tað kann kastast leiðsluni fyri at slíkar hópuppsagnir skulu til, sigur Signar á Brúnni, at í hesum skrivi sum leiðslan fekk í juni í fjør liggur so, at leiðslan skal fáa tað at bera til, og vit fara ikki at leggja okkum í, hvussu leiðslan ger tað. Tá ið løgtingið ikki vil játta sjónvarpinum pening, ja so má leiðslan sjálv reka stovnin á sín hátt, sigur mentamálaráðharrin, og vísir eisini til at Fíggjarmálasýrið kom eisini inn í myndina í fjør við sínum treytum.

# Varisliga privatisering av almennum partafeløgum

*Fyri at náa út til ein breiðan keyparaskara beinanvegin, eigur at verða kannað, um teir 6000 – 7000 núverandi privatu partaeigararnir í Føroya Banka, og fyrrverandi eigarar í Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, sum fingu teirra partabrøv niðurskrivað, ikki eiga at fáa ein fyrimun í samband við keyp av nýggjum partabrøvum, sigur Edmund Joensen í viðmerkingunum til uppskot um varisliga privatisering*

ÓLAVUR Í BEITI

Edmund Joensen hevur lagt uppskot fram vegna Sambandsflokkin um at fara undir eina varisliga privatisering av teim almennu partafeløgunum, men tað skal verða beinanvegin.

Í viðmerkingunum til uppskotið, sigur Edmund Joensen, at Sambandsflokkurin hevur alla tíðina hildið, at so skjótt sum ringasta kreppan var av, átti at verðið farið undir eina normalisering av eigaraviðurskiftunum í Føroya Banka. Somuleiðis var ætlanin við at gera stovnar til partafeløg bara fyrsta stigið á leiðini, áðrenn farið varð undir at privatisera.

– Tað kemur eisini til sjóndar í avtalunum, sum vórðu gjørdar ímillum donsku stjórnina og Føroya landsstýri, hvørjar ætlanirnar vóru við Føroya Banka. Nevndin í Fíggingargrunninum kom eisini, saman við leiðsluni í bankanum, við beinleiðis uppskoti um, hvussu hetta kundi gerast.

### Sølu av partabrøvum

Sambandsflokkurin mælir til, at farið verður undur eina varisliga sølu av partabrøvum til privatar. Byrjað verður við at selja til dømis eini 10 – 15% fyrsta árið, fyri síðani at halda fram ár um ár, sigur Edmund Joensen.

– Fyri at náa út til ein breiðan keyparaskara beinanvegin, eigur at verða kannað, um teir 6000 – 7000 núverandi privatu partaeigararnir í Føroya Banka, og fyrrverandi eigarar í Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, sum fingu teirra partabrøv niðurskrivað, ikki eiga at fáa ein fyrimun í samband við keyp av nýggjum partabrøvum.

– Tað er ómetaliga týdningarmikið, at Føroya Banka verða skaptar bestu umstøður til at gerast ein av »krumtappunum« í føroyska fíggjarheiminum og samfelagnum. Við einum vaksandi privatum eigaraskara fer hann eisini at hava frísku menniskjasálina sum drívmegi. Vandin er stórur fyri at bankin, í verandi støðu, ikki fær virkað, sum ein fríur banki eigur at gera, millum annað tí at nevndarlimirnir eru politiskt valdir.

### Bara 1. stig

– Í sambandi við, at Føroya Tele og partur av Tryggingarsambandi Føroya vórðu gjørd til partafeløg, var ætlanin at koma føroyska samfelagnum burtur úr tí monopolstøðu, sum feløgini høvdu. Hetta var fyri okkum í Sambandsflokkinum bara fyrsta stigið. Tann ætlanin er framd, og borgarin hevur longu merkt týðiliga broyting til tað betra, bæði í prísum og í betri tænastu.

– Næsta stigið er sjálvsagt at fara undir eina varisliga privatisering av hesum fyritøkum. Við hesum verður tryggjað, at menningin av fyritøkunum heldur fram, so borgarin framhaldandi fær eina betri og bíligari tænastu.

– Tá ið Sambandsflokkurin mælir til at fara varisliga fram, so verður her hugsað um, at sera umráðandi er at fáa rætta virðið fyri ognirnar hjá tí almenna. Eisini vil flokkurin við hesum tryggja, at sølan fer fram í millum føroyingar, sigur Edmund Joensen í viðmerkingunum til uppskotið.





# Gongur striltið

*Enn liggur gamli Jupiter við bryggju í Gøtu, men eigararnir vóna, at hetta ikki verður so leingi afturat. Talan er um, at skipið skal seljast til Russlands*

JÁKUP MØRK

Gamli Jupiter, sum framvegis er á føroyskum hondum, liggur enn í Gøtu, hóast talan leingi hevur verið um at selt skipið.

Annars hoyrdist herfyri, at skipið var selt, man tá vit spyrja reiðarunum, Atla Hansen, um hann kann vátta hesum, svaraði hann: »Hevði tað verið so væl«.

### Sáttmáli gjørdur

Atli greiðir tó frá, at russar hava verið og hugt at skipinum, men tað langa tíð at arbeiða við eini slíkari sølu.

Umleið hálvt ár er nú liðið, síðani russar vóru her og hugdi at skipinum, og sum so hava teir helst verið nøgdir við tað, sum teir hava sæð.

Í øllum førum kann Atli Hansen vátta, at sølusáttmáli er gjørdur, men at sølan ikki er avgreidd fyri tað. Hetta tí tað við einum sølusáttmála fylgja ymsar treytir, sum bæði keypari og seljari skulu uppfylla, og enn restar so nakað í hesum viðvíkjandi, greiður Atli frá, uttan at útgreina nærri, hvørjir lutir av sáttmálanum talan er um.

Sambært reiðaranum er enn ikki greitt, nær endaliga sølan kann fara fram, og heldur ikki er gjørligt at fáa upplýsingar um søluprísin. Upp á spurningin, hvørt teir eru nøgdir við prísin, er svarið, at teir sum so ongantíð eru nøgdir við prísin, men at tað týdningarmesta hjá teimum er at sleppa av við bátin, sum við tíðini er komin nakað upp í árini. Gamli Jupiter varð bygdur afturi í 1972.

### Gongur hampuligt

Annars verður sagt úr Gøtu, at fiskiskapurin hjá nýggja Jupiter hevur gingið hampuliga væl higartil, men so heldur ikki meir.

- Veðrið var sera ringt í desember mánaði, so tá hylnaðist einki serligt, greiður Atli frá. Higartil í ár hava teir verið og roynt eftir makreli, og nú verður so farið eftir lodnu.

Vónirnar til nýggja skipið eru tó góðar, og reiðarin heldur fyri, at vóru tær ikki tað, varð ongantíð farið undir hetta nýggja projektið.

Tað er P/F Driftin, sum eigur og rekur Jupiter.

# Nýtt prestagjald

*Gongst eftir ætlan, verður nýtt prestagjald skipað í Eysturoynni um knappan mánaða. Nýggja prestagjaldið fær heitið, Glyvra prestagjald*

JÁKUP MØRK

Eftir ætlan skulu Fuglfarða og Nes sóknar prestagjald skipast av nýggjum, og fer hetta væntandi at viðføra, at vit innan stutta tíð hava fingið enn eitt prestagjald her á landi, Glyvra prestagjald.

Hetta merkir, at bygdirnar frá Runavíkini til Skipanes, umframt Rituvík, verða skipaðar undir nýggja prestagjaldinum, og og at Gøturnar síðani verða lagdar afturat tí, sum tá er eftir av Nes sóknar prestagjaldi.

Fuglafjarðar prestagjald kemur sostatt at fevna um somu bygdir sum frammanundand, Gøturnar tó undantiknar.

Enn er ikki endalig avgerð tikin hesum viðvíkjandi, men Hans Jacob Joensen, bispur, sigur við Sosialin, at málið í løtuni liggur hjá Kirkjumálaráðnum.

### Um knappan mánað

Verður ætlanin veruleiki, fer hetta samstundis at merkja, at nýggjur prestur skal setast í Glyvra prestagjaldið, sum tað ætlandi skal nevnast. Enn er sjálvsagt einki avgjørt í so máta, men verður starvið lýst leyst at søkja til ta tíð.

Hans Jacob Joensen greiður annars frá, at hann enn ikki veit, nær eitt møguligt býti av prestagjøldunum skal fara fram, men at hann tó munnliga er kunnaður um, at hetta helst verður longu 1. mars.

Um so verður fæst helst skjótt av vita, tí neyðugt er við kongaligari resolutión, soleiðis at Margretha Drotning skal skriva undir



*Glyvra kirkja, sum verður ein av kirkjunum í nýggja prestagjaldinum*